# Ein floyta er ein floyta...

**Hann hevur havt ein fingur við í spælinum hjá so ymsum tónleikararum sum Teiti, MC Hár og Guðrið Hansdóttir. Í kvøld fáa vit høvi at uppliva Aldubáruna framføra prótøkukonsertina hjá nýútbúna tónaskaldinum Tróndi Bogason**

PORTRETT
*Kinna Poulsen*

Hann er sonur Boga Hansen og Bergtóru Hanusardóttur, føddur í Havn í 1976, her hann gekk síni fyrstu skúlaár í Nonnu- og síðani Kommunuskúlanum, áðrenn hann fór niðan í Hoydalar. Hann byrjaði at lesa tónleik á universitetinum í Keypmannahavn, men skifti í 1999 til konservatoriið, har hann í 2005 gjørdist kandidatur í kompositión, og har hann til nú hevur hann gingið í einum serligum komponistaflokki. Tróndur er búsitandi í Keypmannahavn, har trý ára gamla dótturin Tóra eisini býr.

Eitt hitt fyrsta, eg ørminnist um hann, stavar frá eini hugnaløtu einaferð síðst í hálvfemsunum, tá undirritaða og tónaskaldið í einari av mongum góðum veitslum í Keypmannahavn hjá útisetakórinum Mpiri, bilsin gjørdust greið yvir, at bæði eru limir í sama eksklusiva klubba av børnum, sum av misgáum komu til at bera skrelliposan við sær í skúla, og sum í grundini alt ov sjáldan fingu rós fyri hesi herligu evni teirra til hugspjaðing og til at vera burturi í øðrum heimi, sum mangan eru hent, ikki minst í sambandi við listina.

Eitt summarkvøld herfyri hitti eg 33 ára gamla tónaskaldið væl seinni á kvøldi enn ætlað. Summarmjørki er í Vágunum, men hetta tykist ei darva Trónd Bogason, sum sær út at kenna seg sera væl á uttanduracaféini í Vágsbotni, glaður um høvið at greiða frá, so eg spyrji, hvussu tað kennist at vera endaliga liðugur við Det Kongelige Danske Musikkonservatorium

Tróndur Bogason (TB): Tað følist frálíkt. Ikki soleiðis at skilja, at tað ikki var gott á konservatoriinum, tí tað vóru ómetaliga lærurík ár. Men nú var tað eisini gott at koma víðari. Eg havi eisini fingið nokkso nógv at gera, havi fingið bíleggingar av verkum, eins og verkætlanir og ymiskt samstarv er í gongd, so eg eri glaður og til reiðar.



*- Nærleikin við føroysku náttúruna hevur eina serliga ávirkan á mín tónleik. Men tað hevur MTV so sanniliga eisini, og tað hevur fyllt minst líka nógv sum Ólavsøkusangurin, sigur Tróndur Bogason, sum júst hevur lokið prógv sum tónaskald á Det Kongelige Danske Musikkonservatorium*

## Spennandi at eg tók feil

Kinna Poulsen (KP): *Hvaðan stavar áhugin fyri tónleiki?*

TB: Eg veit ikki rættiliga, men mamma spældi klaver, og tey lurtaðu nógv eftir klassiskum tónleiki heima. Tað er ikki fyrr enn nógv seinni, eg havi hugsað, at hetta óivað hevur havt týdning. Eg sat og klimpraði og byrjaði at ganga til klaver nokkso tíðliga, tá eg var eini tíggju ára gamal. Klaverlærarin, Bjarni Restorff, var fínur og dugdi at gera frálæruna áhugaverda fyri meg við hóskandi avbjóðingum, so at eg gjørdist alsamt meira áhugaður í tónleiki. Bjarni fekk eisini eitt sindur av ástøði inn í frálæruna á tann hátt, at vit diskuteraðu og tulkaðu tónleikin uppá ein sera pedagogiskan máta, so at eg spakuliga fekk eina kenslu av, hvat tónleikur er. Síðan lærdi eg meg at spæla gittara – ikki at eg dugi øgiliga væl, men eg fann í hvussu er útav, hvussu gittarin fungerar í mun til klaverið. Eg og Fríði Øster spældu nógv saman og seinni eisini saman við øðrum, og hetta at spæla í bólkum vant uppá seg, og tónleikurin bleiv eisini spakuliga betri.

*KP: Og so vart tú maðurin handan legendariska bólkin MC Hár við óskikkiligu tekstunum og rættiliga ambitiøsu kompositiónunum, men tá vart tú vorðin nokkso vaksin?*

TB: Nei, eg haldi ikki, at eg var nógv meira enn fimtan, tá tað byrjaði við Niels Una, Allan og øllum møguligum. MC Hár var ein øgiliga skiftandi forsamling av nógvum fólkum, sum kendust, og sum komu saman at spæla. Í grundini var tað heilt frá byrjani, at eg skrivaði sangir, og tað bara vant uppá seg. Tað mesta av tí er ongantíð blivið spælt, men tað hevur allíkavæl verið góð trening, og áhugin gjørdist alsamt størri.

*KP: Men tað er nokkso langt ímillum vanligan tónleikaáhuga og at spæla við ymiskum bólkum og so tað at fara á konservatoriið. Nær kom tann avgerðin?*

TB: Eg haldi, tað var, tá eg gekk í studentaskúla, at áhugin fyri nýggjum tónleiki kom. Eg hevði verið til onkrar konsertir og helt tað vera tað reina plingplong. Eg skilti als ikki ein pinn av tí, men eg var forvitin og í grundini áhugaður í at fáa staðfest hendan varhugan av, at tað var nakað tvætl. Men eg fann útav, at eg tók feil, og tað var altso spennandi.

## »Le Sacre du Printemps«

*KP: Var tað nakað serligt, sum gav tær hesa ásannan av, at tú fórt skeivur?*

TB: Ja, tað var »Le Sacre du Printemps« (Várhalgan) hjá Stravinski. Eg hevði lisið um hetta verkið frá 1913 í einum tónleikaleksikon, har tað stóð hvussu fantastiskt og progressivt tað var og um øgiligu gøluna, sum var, fyrstu ferð tað varð framført í Paris. So eg koyrdi tað frá, og tað var ræðuligt og strævið at lurta eftir og eg skilti einki av nøkrum. Men tá eg so hevði hoyrt verkið einar fýra ferðir, skilti eg ikki meir hvat tað var, eg ikki hevði skilt. So var tað knappliga nakað tað besta, eg nakrantíð havi hoyrt.

*KP: Hvussu gamal vart tú tá?*

TB: Seytjan ella átjan haldi eg. Tá var Sunleif (Rasmussen) eisini byrjaður at hava kompositiónsskeið í Føroyum, og vit vóru nøkur, sum gingu har. Tað gav mær ómetaliga nógv. Eg gekk til privatundirvísing hjá Sunleif og helt fram við tí, tá eg kom niður. Eftir eini tvey ár søkti eg inn á konservatoriið. Sunleif hevur sostatt havt stóran týdning fyri meg, men tað hava Summartónar, sum Felagið Føroysk Tónaskøld byrjaðu í 1992 í grundini eisini. Nýggjur tónleikur er jú ikki nógv at hoyra í útvarpinum, so tað er umráðandi at hava ein tílíkan festival. Eitt av endamálunum við Summartónum er fáa gongd á skrivingina av føroyskum tónlistaverkum, og tað hevði jú øgiliga stóran týdning fyri meg, at eg slapp at skriva til teir ymisku tónleikararnar, ið vitjaðu hendan vegin sum t.d. íslendski bólkurin Caput, ið spældi eitt av mínum verkum.

*KP: Hvat annað hevur havt týdning?*

TB: Eg havi havt nógvar ótrúliga dugnaligar lærarar á konservatoriinum, t.d. hevði eg Hans Abrahamsen í kompositión, og hann lærdi meg eina rúgvu um at vera nágreiniligur og at gera arbeiðið liðugt. Merete Westergaard var framúrskarandi lærari í hoyrilæru, og hon lærdi meg t.d. at lesa frá blaðnum. Eg haldi eisini, at eg lærdi okkurt serligt av tíðini í Hollandi á The Royal Conservatoire í Den Haag, tí har vóru tey meira strang. Alt gott um danska konservatoriið, men tey eru rættiliga liberal. Ráðandi sjónarmiðið tykist vera, at øll hava rætt og at alt er loyvi. Tað gekk als ikki í Hollandi, tí har mátti tú veruliga arbeiða og halda teg til reglurnar. Tað var ivaleyst gott fyri meg, og eg lærdi nógv av at vera noyddur at oppa meg og arbeiða meira disiplinerað. Somuleiðis hava tey tíggju árini í Mpiri eisini lært meg nógv t.d. um kontrapunkt. At síggja hvussu kórleiðarar arbeiða við tilfarinum, at uppliva hvussu t.d. Gorm (Larsen – kórleiðari hjá Mpiri) arbeiðir við renesansutilfari er fantastiskt. Eisini var tað lærurikt at uppliva, hvussu Sunleif arbeiðir við at fáa tað at stemma.

## Bábel – debutkonsertin

Í kvøld verður konsertin framførd, sum var endaliga prótøkan hjá Tróndi á konservatoriinum. Eg undrist á, hvussu hann byrjar uppá eitt tílíkt verk, um tað er ein melodilinja ella eitt hugskot?

TB: Tað byrjar allarhelst við eini ljóðmynd, sum eg havi inni í høvdinum, men eg haldi í grundini tað rigga best, tá tað liggur í sjálvum hugskotinum, hvussu verkið verður framført. Eg havi longu broytt okkurt, sum eg ikki helt fungeraði so væl á debutkonsertini. Men konseptið er grundleggjandi tað sama og tað er serligt við tað, at fleiri bólkar spæla í senn í fleiri rúmum. Tey spæla hvør sítt individuella stykki bæði í senn og viðhvørt hava tey steðgir, so tað kann kanska rópast eitt slag av installatión við tónum. Meiningin er, at áhoyrarin sjálvur ger av, hvar hann stendur ella um hann gongur runt millum bólkarnar. Á henda hátt gerst ljóðupplivingin interaktiv, og haldi eisini, at tað er sum um, at sjálvar konsertrammurnar blotna onkursvegna. Klassiskar konsertir eru so øgiliga sið-bundnar við smoking

> *Tað var ræðuligt og strævið at lurta eftir Stravinski, til tað knappliga var nakað av tí besta, eg havi hoyrt*

> *Nýggjur tónleikur er jú ikki nógv at hoyra í útvarpinum, so tað er umráðandi at hava ein festival sum Summartónar*